# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Bilradio á Rás2*

*Bilradio verður sent hósdag kl. 16.05, fríggjadag kl. 8.05 og leygardag kl. 13*

# Ssangyong C200 í París

**Á altjóða bilaframsýningini í París í hesum døgun, verður ein heilt nýggjur Ssangyong C200 sýndur fram**

Ssangyong C200 er designaður hjá ItalDesign í Italia, ið samstarva við Ssangyong um nýggj bilmodell.Ssangyong C200 er ein SUV, sum eftir ætlan kemur á marknaðin í 2009.

Suðurkoreanska Ssangyong verksmiðjan verður stýrd av Shanghai Automotive Industries Group í Kina, sum hava ætlanir um at koma á marknaðin við ikki minni enn 20 nýggjum bilmodellum á fimm ymiskum nýggjum plattformum næstu fimm árini. C200 er fyrsti bilur í hesi verkætlan.

Shanghai Automotive eiga eisini Rover, sum hava skift navn til Roewe. Ssangyong og Roewe koma helst at verða bygdir yvir somu plattformar og koma at verða gjørdir sum bæði vanligir persónbilar og SUV.

**mg**





*Ssangyong C200 er ein SUV, sum eftir ætlan kemur á marknaðin í 2009*

# Nýggjur Mazda3 í Los Angeles

**Ein heilt nýggjur Mazda3 sedan hevur heimspremieru á bilaframsýningini Los Angeles Auto Show, sum letur upp 19. november 2008**

Nýggi Mazda3 sedan kemur í 2009 til Evropa saman við hatchback-útgávuni við fimm hurðum. Mazda3 hevur sama designstíl sum nýggju Mazda2 og Mazda6.

Mazda3 er ein týðandi bilur hjá Mazda. Teir hava staðið fyri umleið einum triðingi av samlaðu søluni hjá Mazda.

Síðan núverandi Mazda3 kom á marknaðin í 2003 eru seldir meira enn 1,8 milliónir bilar í 100 londum kring heimin, og bilurin hevur vunnið meira enn 90 heiðurslønir. Mazda3 varð eisini kosin Årets Bil i Danmark 2004.

**mg**





*Mazda3 sedan hevur heimspremieru á Los Angeles Auto Show*